## Spennandi ætlan í Hoyvík

Í longri tíð hevur verið arbeitt bæði tíðliga og síðla viðat gera nýggja skúlan við Løgmannabreyt í Hoyvík lidnan til skúlaársbyrjanina. Í dag er so henda ætlanin vorðin veruleiki, og í morgun fóru 42 næmingar á fyrsta sinni í skúla og á fyrsta sinni í tann nýggjasta føroyska skúlan. Saman við teimum fara 48 næmingar í 2. flokk og 21 í 3. flokk. Komandi skúlaárið verður skúlatilboðið víðkað til at umfata allar 10 flokkarnar.



## Kommunuskúlin er tann størsti

Yvirlitið frá Mentamálaráðnum vísir, at Tórshavnar Kommunuskúli (myndin) er størsti einstaki skúlin kring landið. Í skúlanum fara hetta skúlaárið at ganga 507 næmingar og eru tað 8 fleiri enn í næststørsta skúlanum, Eystursklúlanum í Havn. Triðstørsti skúlin við 438 næmingum er Venjingarskúlan, men størsti skúlin uttanfyri høvuðsstaðin er Runavíkar skúli við samanlagt 436 skúlum. Hinvegin eru fleiri skúlar við bert einum einstøkum næmingi. Hesir skúlarnir eru í Skúvoy, Funningi, Kirkju/Hattarvík og í Hesti.

# ikki er einsamøll genta

at ein nýggjur lærari skal koma í skúlan. Sára verður ikki einsamøll, men fær felagsskap frá Olafi á Grønastøð og Hannebeth Garðalíð. Hetta vistu teir sjey frammanundan, og hetta hava teir eisini gjørt sær sínar hugsanir um:

- Tú, Hannebeth. Passar tað at tú fert at koma heim til okkum at vita, um vit gera skúlating?, vil ein teirra hava at vita.

Hannebeth svarar ikki beinleiðis uppá spurningin, men tann eini næmingurin ger helst sítt til at hesin óroyndi møguleiki – ella hóttanin – neyvan gerst veruleiki.

Honum dámar nevniliga best at gera skúlating heilt tíðliga uppá dagin!



*Níggju næmingar eru í Húsa skúla hetta skúlaárið: Aftast vinstrumegin: Ragnar Joensen (9. flokkur), Benjamin Isaksen (7. flokki) og Pætur Syderbø (8. flokki). Miðraðið: Dávur Syderbø (5. flokkur), Óli N. í Lon (5. flokkur) og Jóhan Høgnesen (5. flokkur). Fremst vinstrumegin: Óli Hansen (4. flokkur), Rebekka Syderbø (1. flokkur) og Ása Hansen (3. flokkur)*

### - Eg elski teldur

Klokkan er ikki farin nógvar minuttir yvir 9, tá Sára Mikladal biður børnini seta seg stillisliga við borðini.

Hon bjóðar teimum vælkomnum aftur í skúlan, og hevur eina serliga heilsan til tann yngsta næmingin, Rebekku.

- Í dag gera vit skjótt av, men tá tit møta klokkan 8 í morgin, so byrja vit álvara at hava skúla, greiðir hon spentu næmingunum frá.

Rebekka sigur við spenningi og lurtar eftir læraranum, og letur ikki við seg koma, at skúlafelagi hennara, Sára roynir at siga okkurt við hana. Her ræður um at fáa alt við, hóast alt er nýtt og kanska trupult og óskiljandi henda fyrsta skúladagin.

Hon hevur taskuna fulla av øllum tí, sum krevst til ein slíkan dag, og gleði seg av álvara at sleppa í gongd við tann veruliga skúlan.

Hvussu verður við lesingini og rokningini, dugur hon ikki til fulnar at ímynda sær, ella hvat ein ger í skúlanum. Okkurt man hon kortini hava hoyrt frá eldru brøðrum sínum – Pæturi og Dávur – tí hon veit longu nú at siga, hvørja lærugrein henni dámar best: Teldur!



*Rebekka Syderbø og Ása Hansen hava funnið "melodí'in", soleiðis sum bara tvær gentur kunnu gera*

- Eg elski teldur, slær hon fast, nú hon bert hevur verið í skúlanum í nakrar heilt fáar minuttir.

Hvør veit, - kanska fer Rebekka einaferð at hava eina framtíð sum teldusnillingur. Áðrenn tað mugu tann grundleggjandi kunnleikin kortini fáast í hús og festa seg í heilanum.

- Eg veit væl, hvat 2 + 2 er, sigur hon. – Tað er fýra!

Jú, Rebekka hevur longu tikið tey fyrstu stigini á skúlaleið. Nú er upp til hana, lærarar hennara og foreldrini at tryggja, at henda leiðin verður væl gongd!

### Svimja í Klaksvík

Hesin fyrsti skúladagurin í bygdini H er skjótt avgreiddur. Longu tá klokkan er farin at nærkast 10 er alt tað praktiska fingið frá hond og allir neyðugir upplýsingar givnir víðari.

Hesar fyrstu tvær vikurnar fara hon og Olaf á Grønastøð at taka sær av næmingunum, men fyrst í september fer Hannebeth Garðalíð at verða tann triði lærarin í skúlanum.

Sára hevur gjørt tímatalvuna til allar næmingarnar og fer nú runt til hvønn einstakan teirra at býta hana út. Spenningur er í luftini, hóast talvan neyvan brýtur alt ov nógv av frá tímatalvuni í fjør.

- Sum tit síggja, so fara vit framvegis til Klaksvíkar at svimja mánamorgun, sigur hon út í stovuna.

Henda útsagnin dámar børnunum væl, og tað er ikki frít at jubil-róp hoyrast frá nøkrum at eldru næmingunum.

Tímatalvan er kortini ikki heilt liðug enn, tí óhugsandi er ikki at hon verður broytt um ikki so langa tíð.

Hetta leggja børnini neyvan so nógv í. Fyri tey hevur tað helst størri týdning at nú er skúlaárið 2008/09 umsíðir upprunnið.

Skúlin ER byrjaður!